# Mel fylti Vágsbø



**Talan var um C vitaminir til glaðar poppfjepparar, tá Melanie C fór á pall á Vágsbø. Ein framførsla, har professionalisman var í hásæti**

SUMMARFESTIVALUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Sjúrður Skaale, frásøgumaður, legði fyri við at kalla svimjaran Pál Joensen fyri Pál Weihe, tá hann fór undir at presentera, men eftir hetta skemtiliga mistak, presenteraði hann Mel C sum fitta, sjarmerandi og dugnaliga.

Og hetta síðsta prógvaði Mel C og sang væl og sannførandi og klokkureint.

Hon hevur eina rødd, ið megnar bæði djúpar og høgar tónar, og har er ongin slingur í walsinum (har er sjálvandi heldur ongin walsur).

Fyrrverandi Spice gentan hevur verið nevnd hon, ið sum hin einasta av Spice gentunum veruliga dugdi at syngja, og sum legði lag í sangskriving. Um hetta er so, er ilt at siga, men hon er tann einasta, ið hevur megnað at flúgva víðari og ikki missa flogið, eftir dagarnar í heimsins største gentubólki.

Fleiri still løg vóru á skránni, men Mel C gav eisini lurtarunum krút og ungu lurtararnir og poppfjeppararnir fingu C vitaminir. Tað var orka í, tá villaru løgini ljómaðu um Klaksvíkina klokkan 22 fríggjakvøldið.

Hetta var sum heild ein konsert, har góðskan og professionalisman vóru í hásæti. Og okkurt lag var eisini heldur tungt, og her fekk Mel prógvað tónleikadygdir, ið annars ikki minna so nógv um popp.

Mel C og manning høvdu eina konsert, ið var á topp støði, men sum helst ikki "rykti nakrar pelar upp", tá talan er um at leggja sær eina konsertuppliving í geyma, men ein góð konsert við góðsku í hásæti og ein góð uppliving.

Og fjøldin var sjálvsagt við, tá eykaløgini Never Be The Same Agan og I Turn To You ljóðaðu, og Mel C megnaði at koma um pallkantin.

*Hetta var sum heild ein konsert, har góðskan og professionalisman vóru í hásæt*

# Fólkakær fólkaogn

**Enn einaferð eydnaðist tað manninum við tí djúpu røddini og villu eygunum, Hanusi G. Johansen, at leggja fjøldina fyri sínar føtur, av sínum eintingum**

*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Eftir framførsluna hjá Mel C fríggjakvøldið, kom Sjúrður Skaale út á pallin og greiddi frá, hvat fór at henda seinni á kvøldinum. Millum annað segði hann soleiðis: -Summar Festivalurin er til, tí Hanus G. Johansen varð føddur.

Og tá ið eg, beint fyri miðnátt, skundaði mær yvir til Torgið, var tjúkt í fólki. Sum sild í tunnu. Sum var tað eitt føðingardagsbarn, ið tey vildu heiðra. So tað var bara at troka seg fólkaliga fram. Fann mær so eitt liviligt stað millum stappaðu mongdina.

Hálvan tíma áðrenn Hanus skuldi á pall, byrjaði framførslan hjá djórunum í Sic í FLAGS-teltinum. Og sum flestum kunnugt gongur tað ikki júst friðarliga fyri seg, tá ið teir sláa seg leysar. Torgið og FLAGS-teltið liggja ikki nógv meiri enn hundrað metrar frá hvørjum øðrum, so tá ið Hanus byrjaði at framføra, var tað við heavy-fylgispæli. Eitt áhaldandi djúpt brum. Ikki beinleiðis kul ella væl lagt til rættis av fyriskiparunum.

Men tað sá ikki út til at tað rein við hjá nøkrum øðrum, tí øll eygu og oyru vóru vend móti manninum á pallinum.

Hanus er Hanus, og tú veitst hvat tú fært: Tað er Poul F. Tað eru vísusangir. Tað eru hansara heilt egnu badabadi-improvisatiónir. Tað er ein maður, ið leggur sína sál í hvønn tóna og sum samstundis hevur bæði beinini plantað á jørðini. Og tey flestu vilja ikki hava nakað annað.

Talan var um eini 5-6 eykaløg, har hann tríggjar ferðir royndi at greiða frá, at hann longu hevði spælt alt ov leingi og mátti loyva Dynamit framat.

At enda varð slókt, og Dynamit var næst á skránni.



*Talan var um eini 5-6 eykaløg, har hann tríggjar ferðir royndi at greiða frá, at hann longu hevði spælt alt ov leingi og mátti loyva Dynamit framat*



*Eyðun og Terji kenna seg altíð heima á pallinum*

# Eyðun og Terji settu lív í

**Hóast fólk fleiri ferðir hava upplivað teir á palli, so settu Eyðun og Terji eina ferð enn lív í áskoðarafjøldina**

SUMMARFESTIVALUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Eyðun og Terji eru altíð góðir. Hóast fólk fleiri ferðir hava upplivað teir á palli, so seta teir hvørja ferð lív í áskoðarafjøldina við sínum eyðkendu sangum.

Framførslan á Vágsbøi leygarkvøldið var einki undantak. Við kendu løgunum sum eitt nú "Eros", "Hvønn Dag" og "Nummar" vóru fólk við. Ótti var fyri, at framførslan, sum varð framskundað, var ov tíðliga, men tað bilti ikki.

Eyðun og Terji kenna seg altíð eima á pallinum. Teir vita, hvat fólkið vil hava, og úrslitið er hareftir. Øll syngja við til sangirnar. Ein lýtaleys framførsla – Eyðun og Terji gjørdu tað aftur.